## Byggja veðurstøð

Danir og kanadiumenn eru komnir ásamt um at byggja eina veðurstøð á oynni Hans Ø, sum er í Nares-sundinum millum Grønland og Kanada. Tey bæði londini hava í mong ár verið ósamd um, hvørt teirra hevur ræðisrættin á Hans Ø, og tann spurningurin er ikki loystur. Nú eru londini so samd um at byggja eina veðurstøð á oynni. Støðin skal millum annað kanna, hví ísurin noraðn fyri Nares-sundið loysnar um veturin og ikki um summarið sum fyrr.

## Grønlendingar eldast

Veksandi burðaravlop ger, at fólkatalið í Grønlandi veksur spakuliga. Tey seinastu árini hevur burðaravlopið ligið um 400, og í fjør var tað 430, sigur útvarpið í Nuuk. Eisini liva grønlendingar longri nú enn fyrr. Tann seinasta frágreiðingin hjá landslækanum vísir, at grønlendskir menn liva í meðal 64,6 ár og kvinnurnar 70,4 ár. Tað er kortini væl stytri enn í hinum Norðurlondunum og kemst av deyðsvanlukkum, sjálvmorðum og sjúkum av royking.

# í illveðri



# Fullfermd í Saltangará



*Nógv landing hevur verið í Saltangará hesa vikuna, og fleiri skip hava verið fullfermd undir lúkurnar. Onnur skip hava eisin havt góðan fong. Alt er upsi, og upsin er betri í ár, enn hann var um hesa tíðina í fjør og fyrraári*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Um hesa tíðina í fjør og fyrraári kom eitt "rend" við smáum upsa, men higartil í ár hevur fiskurin verið meira javnur og góður til støddar, siga tey hjá Føroya Fiskavirking**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í vikuni hava fýra skip verið fullfermd í Saltangará, og onnur hava verið við góðari last.

Í gjár landaðu Bakur og Stelkur. Teir høvdu umleið 400.000 pund av upsa og vóru tískil fullfermdir undir lúkurnar. Skipini hava verið úti í eina viku, men veðrið hevur verið ólagaligt. Ti var royndin hendan túrin einar seks dagar tilsamans.

### Maskinbrek

Bakur og Stelkur steðga ongantíð inni, og ætlanin var at loysa aftur í gjárkvøldið. Men okkurt brek á maskinuni hjá Stelki hevur tarnað skipunum at fara útaftur.

Tá ið vit frættu í morgun, lógu skipini framvegis inni og roynt verður at loysa trupulleikarnar hjá Stelki.

Mánadagin landaðu Polarhav og Stjørnan. Teir vóru eisini fullfermdir. Veiðan var umleið 440.000 pund, kanska meira.

Í dag landa Jaspis og Ametyst hjá Føroya Fiskavirking í Saltangará. Teir hava eini 160.000 pund.

Grímur Kamban og Kalsevni eru eisini inni í dag, men tá ið vit frættu úr Saltangará, vistu tey ikki at siga, hvussu nógv skipini hava inni.

Tað er Aksel Hansen, sum eigur Grím Kamban og Kalsevni, ið eru keyptir úr Íslandi.

### Góður upsi

At kalla øll veiðan hjá partrolarunum er upsi og tað, sum sermerkir upsan í vetur, er, at hann er størri enn eitt nú í fjør og fyrraári.

- Um hesa tíðina í fjør og fyrraári kom eitt "rend" við smáum upsa, men higartil í ár hevur fiskurin verið meira javnur og góður til støddar, siga tey hjá Føroya Fiskavirking.

Lagt verður aftrat, at eini 40-50% av veiðini í løtuni er 3'arar, og meginparturin av restini eru stórir 4'arar, sum eisini er góður fiskur.